# ið uppá spæl



*Sjúki drongurin David fær okkum at hugsa um lívið av nýggjum, tá hann setur markið millum dreym og veruleika úr gildi í leikinum »Aftan á undrið«*

ur av. Kanska ikki so ógvusliga, men jú - onkursvegna er leikurin eisini ein viðmerking til ávís rák í okkara tíð, viðgongur høvundurin.

- Sjónleikur er jú eisini ein fantastiskur ein møguleiki at mála brot av okkara siðmenning - ella mangul uppá siðmenning - í sterkastu litum. Og onkuntíð má man niður at róta í skræpuni, sum siðmenningin er sprottin úr, hugleiðir Jóanes Nielsen.

### Undrið í India

Tað eru nøkur ár síðani eftirhondini, at Jóanes Nielsen byrjaði at skriva leikin. Av ymsum orsøkum er støðgur komin í, antin tí onnur skriving trokaði seg á, ella tí íblásturin ikki heilt var, sum høvundurin ynskti.

Men so fyri eini tveimum áum síðani kom verulig ferð á, tá kona hansara bað hann koma ein túr við til India, har hon skuldi mála. Við sær hevði Jóanes Nielsen nøkur leys ørk og hálvliðug brot av leikinum.

- Eg veit ikki, hvat hendi, men knappliga fekk eg eitt veldugt anfall av íblástri. Tað er sovorðið, man sum listafólk næstan ikki torir at droyma um - eitt undur, sum gjørdi, at eg skrivaði leikin lidnan út í eitt eftir trimum vikum á eini aldu av íblástri og skrivigleði, sigur Jóanes Nielsen, sum eisini er sera takksamur fyri seinni at hava fingið møguleika at brýna handritið saman við royndа teaturmanninum Eyðuni Jóhannesen.

Eisini hevur høvundurin havt stóra gleði av at hava sæð eina H.C. Andersen uppseting á Odin teatrinum í Holsterbro, sum gav honum virðismiklan íblástur til, hvussu man kann bróta kronologiina í einum leiki og petta brotini saman av nýggjum á ein meiningsfullan hátt.

- Tann partin havi eg brúkt rættiliga nógva orku og tíð uppá. Bæði tí leikurin skapar sítt egna tíðarunivers, og tí søgan flýgur frá tí heilt konkreta og inn í ein mytologiskan heim, sigur Jóanes Nielsen.

Spurdur, hvussu tað kennist, at síggja onnur leggja kropp og rødd til hansara orð, sigur høvundurin, at slíkt altíð snýr seg um álit.

- Sjónleikur er altíð eitt samstarv, og tú er noyddur at líta á tey fólkini, tú arbeiðir saman við. Tá tað eydnast er tað fantastiskt, og beint nú sær hetta absolutt út til at rigga, sigur Jóanes Nielsen, sum enn ikki hevur sæð leikin í síni lidnu heild.

- Tað er við vilja. Eg havi siti einsamallur við hesum leikinum so leingi, at nú vil eg sleppa at vera áskoðari til frumframførsluna og lata meg yvirraskað og undirhalda, sum øll hini í salinum, sigur leikhøvundurin, Jóanes Nielsen.



*Nýskrivaði leikurin hjá Jóanesi Nielsen, »Aftan á Undrið« er ein tann størsta uppsetingin hjá Tjóðpallinum higartil við einum meldri av leikarum, tónleiki, sangi og gandakendum pallmyndum*



*- Mítt arbeiði má hava verið á eini leið, tí enn hevur Jóanes ikki givið mær fótin sum leikstjóri, sigur íslendski Gudjón Pedersen, sum leikstjórnar »Aftan á undri« eftir Jóanes Nielsen*

# Jóanes Nielsen elskar Gud

**»Aftan á undrið« er eitt dømi um áhaldandi kærleiksstríðið hjá leikhøvundanum við Gud, sigur leikstjórin Guðjón Pedersen, sum ikki kennir nakað listafólk, sum elskar Gud so høgt, sum Jóanes Nielsen**

LEIKSTJÓRN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað hevur kravt sín leikstjóra at at seta upp nýggja leikin hjá Jóanesi Nielsen »Aftan á undri«. Tí varð eisini leitað til Íslands eftir einum tí mest roynda leikstjórnum har, Guðjóni Pedersen, sum hevur meir enn 20 ár á baki sum leikstjóri.

Sum eitt tað fyrsta fór leikstjórin undir at lesa tað mesta av tí, sum Jóanes Nielsen hevur skrivað fyri at seta seg inn í hansara myndamálsliga og lívsfilosofiska heim.

- Fyri meg snarar meginparturin av ritverkinum hjá Jóanesi Nielsen um hansara áhaldandi kærleiksstríð við gud. Eg kenni onki listafólk, sum elskar gud so høgt sum Jóanes Nilesen. Tað fært tú hann bara aldrin at viðganga, flennir leikstjórin.

Eftir hansara tykki kemur hetta kærleiksstríðið týðiligast til sjóndar í hesum leikinum, tá tú byrja at ivast í, um hetta er ein sorgarleikur ella ein fagnaður av lívinum.

- Á ein hátt er hetta ein syrgilig søga. Men hetta er eisini ein gleðiligi søga í tann mun, at tað kann vera ein lætti at fáa nakað ræðuligt at vita um seg sjálvan, tí so hevur tú fingið eina vissu, sum ger, at tú kanst liva víðari, sigur Guðjón Pedersen heldur kryptiskt.

### Upp til stjørnurnar

Stóra avbjóðingin hjá leikstjóranum hesuferð hevur verið arbeiðið við markinum millum dreym og veruleika.

- Í fyrsta umfari havi eg verið noyddur at finna ein máta at skilja dreym og veruleika sundur, so leikurin ikki blívur eitt LSD-tripp, har alt bara flýtur saman. Hinvegin, so blívur dreymur ein partur av veruleikanum í leikinum sum frá líður, og tá má eg finna ein máta at taka markið burtur aftur, sigur leikstjórin og leggur afturat

- Eina dreymasøgu kanst tú altíð fortelja, men tað nyttar onki, um hon ongan logikk hevur. Tú mást fáa tingini niður á jørðina, áðrenn tú kanst klatra upp á stjørnurnar, sigur leikstjórin, sum á ongan hátt hevur kent seg avmarkaðan av at arbeiða í einum so lítlum leikhúsi sum Tjóðpallinum.

- Tvørturímóti. Tað hevur verið reint luksus at arbeiða á einum teatri, har fólk eru so eldhugað og geva seg sjálvi fult og heilt. Eg havi abeitt á nógvum stórum teatrum, men nógv av teimum eru at líkna við reinar fabrikkir. Umhvørvið her hevur eina heilt aðra sál, sigur leikstjórin, sum eisini er sera glaður um samstarvið við Jóanes Nielsen.

- Vit hava havt endaleys prát, ið sum oftast eru byrjað við kaffi og endað við whiskey. Og so havi eg gjørt honum greitt, at um hann ikki lítur á meg, so má hann finna sær ein annan leikstjóra. Tað hevur hann so ikki gjørt enn, so mítt arbeiði má hava verið á eini leið, smílist leikstjórin.